

*Mótaframsýning var bæði kvøldini. Tær savnaðu nógv fólk við pallin*

*Mynd: Heini S. Kristiansen*

# Sølurásin á Skála

Sølurásin í ítróttarhøllini á Skála var í vikuskiftinum. Har vóru alskyns framsýnarar á sølustevnuni. Heilt fitt av fólki fór ein túr inn í høllina. Serliga sunnudagin vóru sera nógvir bilar uttanfyri høllina. Á pallinum vóru ymsar framførslur frá tónleikarum. Eisini vóru mótasýningar við klæðum frá handlunum, sum luttóku á sølustevnuni. Mótasýningar savnaðu fleiri fólk við pallin. Tað var Skála Ítróttarfelag, Strálan. Skála Róðrarfelag og STÍF, sum skipaðu fyri Sølurásini.

**- heinik**



*Hesi trý hugnaðu sær á hátíðarhaldinum í nýggja barnagarðinum á Strondum leygardagin*

*Mynd: Heini S. Kristiansen*

# Stórur áhugi fyri nýggja barnagarðinum

Nýggi barnagarðurin á Strondum er tikin í nýtslu í morgun. Leygardagin var hátíðarhald í nýggja barnagarðinum. Um 400 fólk støkku inn á gólvið at síggja snotuligu hølini. Øll starvsfólkini tóktust at vera sera væl nøgd við nýggja barnagarðin, og fólk sum heild vóru í góðum lag. Tað tykist, sum nógvir strandingar hava áhuga fyri barnagarðinum.

Borgarstjórin fegnast um nýggja barnagarðin. Hon staðfestir, at hann longu er fullur av børnum. Sostatt er tørvurin ikki stillaður langt fram í tíðina, um tørvurin gerst størri.

Les meira um hátíðarhaldi í blaðnum í morgin. Har hava vit eisini samrøðu við Malanu Thomsen, borgarstjóra.

**- heinik**

